# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019/20



## SPURDÓMUR: VIT UNDRAST Á, UM MAN KANN LIVA Í VIRTUAL REALITY?



Granskarar: 6. flokkur í Sandoyar Meginskúla

# INNGANGUR

Vit vilja vita, um vit kunnu liva í VR. Men tað hevði verið møguligt at liva í VR, tí um vit høvdu liva í VR, so hevði grafikkur verið so góður, at vit kundu ikki vita, um tað var ordiligt lív.

Lærari:Jógvan Vest (jv1203n3@skulin.fo)

Luttakarar: Kjartan, Demmus Rói, Jákup Andrias, Martin, Brandur, Sigurður, Ata, Sissal, Vár, Rúna, Sandra, Andrea, Sarita, Sesilia, Karin Christina og Elsi.

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit

Er tað møguligt at liva í Virtual Reality

2. Hví er tað so?

- Ber tað til kropsligt?
- Hvat hendir við heilanum?
- Kann man gera sovorðið?

3. Legg eina ætlan

- Uppdeiling í bólkinum
    - Granskarar
    - Skrivarar
    - Interviewarar

4. Savna upplýsingar

- Spurdu ymisk fólk
- Høvdu samrøðu við lækna
- Royndu VR-sett
- Googlaðu

5. Hetta eru vit komin fram til

- Tað ber til kropsligt
- Kostnaðarmikið
- Torført
- Ikki gott fyri eyguni
- Mesta vit vita um er 1-2 mánaðir

6. Sig øðrum frá

- Siga frá við at taka ein vanligan skúladag upp, og so seta tað inn í VR. Síðani fáa fólk at uppliva hetta, hvussu dagurin sær út, við eygunum hjá einum øðrum.

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undrast á um man kann liva í Virtual Reality



Og hvussu man kann eta og hvussu man ger nr.1 og 2.

Og hvussu man heldur musklarnar sterkar

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Tí at tað er sum at liva í einari fantasiverð.

Og man kann gera alt og man kann fáa alt sum man vil hava.

.

## 3. LEGG EINA ÆTLAN

Vit fara í bólkar, ein bólkur skrivar, tveir leita á internetinum, og ein interviewar. Vit ætla at snakka við Jeaneth Løkjá, hon er kommunulækni. Og vit fara at ringja til Power og Elding.



## 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Tit funnu útav, at mann fær mat í gjøgnum rør, sum fara í nøsina ella æðrarnar.

Og so kukkar man í blæu. Og tað hevði ikki verið gott fyri eyguni, so robottar mugu hjálpa tær og strekkja musklarnar, men tú fer at missa nógvar musklar. Og teir mugu skifta blæu tína. Vit hava spurt Power um vit kunnu lána eitt VR headset. Tey kundu ikki lána okkum eitt VR headset. Men so ringdu vit til Elding, og tey søgdu ja. So ein leygardag

fóru vit til Elding í Havn. Og prøvaðu eitt Oculust Quest 68g VR headset.

Vit snakkaðu eisini við Jeaneth Løkja:

1. **Hvussu kann man fáa mat?** Man fær eitt rør niður ígjøgnum nøsina, sum eitur sonda, sum er rørið, ið man eisini kann fáa mat ígjøgnum æðraðar

2. **Hvussu kann man kukka og pissa?** Tey kukka í blæu.

3. **Ger man tað sama við børn?** Eg haldi tað.

4. **Hvussu heldur man musklarnar, tá man er í einum koma?** Man missur musklarnar uttan venjing, so man má venja musklarnar nógv, tá man er komin úr einum koma.

5. **Veksur man tá man er í einum koma?** Ikki so nógv.

6. **Hvussu følist tað at vera í einum koma?** Tað veit eg ikki.

7. **Hvat er tað longsta man kann vera í einum koma?**
   Man steðgar við at hjálpa teimum í koma aftan á eina løtu

Vit prøvaðu eisini eitt VR headset, myndir niðri undir av okkum.

Kjartan: eg helt at tað var mega stuttligt og  eg helt at tað føldist ordiliga veruligt. Tað var bara stuttligt🤗

Martin tað var nokkso stuttligt, og tað ristist veruliga 😛

Jákup Andrias: Tað føldist ordiligt 😛

Brandur: Tað føldist veruligt! Tað føldist, sum okkurt kom eftir mær! Ta var so stuttligt 😁

Demmus Rói: Tað føldist gott, at vera í Virtual Reality, og tað var stuttligt og føldist veruligt😊


Foroya Tele
09.50
94 %
Færdig
Rediger
Mere


Foroya Tele
09.50
94 %
Færdig
Rediger
Mere


Foroya Tele
09.50
94 %
Færdig
Rediger
Mere


Foroya Tele
09.50
94 %
Færdig
Rediger
Mere




Vit takka Elding fyri at hjálpa okkum og lána okkum eitt Virtual Reality sett

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Ja, tað er møguligt at liva í Virtual Reality, men tað hevði verið ringt og dýrt, tí at fáa robottar at gera ting fara at kosta nógv, og VR headsettini fara eisini at kosta nógv.



# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit hava tosa um hetta við nógv fólk, næmingar, lærarar og læknar.



# FYLGISKJØL